# Sáttmáli

# fyri pedagogar

# millum

# Føroya Pedagogfelag
# og
# Fíggjarmálaráðið og

# Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# 2023-2026

Innihald


**§ 1. Sáttmálaøki** ... 1

**§ 2. Setanartreytir** ... 1

**§ 3. Løn** ... 1

*A.Dagstovnaøkið* ... *1*
*B. Almannaverkið og sjálvsognarstovnar undir landinum* ... *2*
*C. Stuðlar, stuðulsstovnar og stuðulsskipanir* ... *3*
*D. Størv í Fólkaskúlanum og á Heilsuskúlanum* ... *3*

**§ 4. Parttíðarsetan** ... 4

**§ 5. Starvsaldur** ... 4

**§ 6. Eftirløn** ... 4

**§ 7. Felagslívstrygging** ... 4

**§ 8. Fyribilssetan í hægri starv** ... 5

**§ 9. Arbeiðstíð** ... 5

**§ 10. Tíð til annað arbeiði** ... 5

**§ 11. Samsýning/løn fyri ólagaliga arbeiðstíð.** ... 5

**§ 12. Gjald fyri summar- og frítíðarlegur** ... 5

**§ 13. Lønarútgjaldan** ... 5

**§ 14. Setanarbræv - Starvslýsingar** ... 5

**§ 15. Frítíðarreglur** ... 6

**§ 16. Frídagar** ... 6

**§ 17. Løn undir sjúku og eftirsitiløn** ... 6

**§ 18. Barnsferð** ... 6

**§ 19. Farloyvi** ... 7

**§ 20. Skeiðluttøka** ... 7

**§ 21. Eftirútbúgving - Víðari útbúgving** ... 7

**§ 22. Førleikaviðbót** ... 7

**§ 23. Undirvísingarløn** ... 7

**§ 23a. Starvslæruvegleiðarar ... 8**

**§ 24. Endurgjald fyri koyring, tíma- og dagpeningur ... 8**

**§ 25. Tænastubúni ... 8**

**§ 26. Telefongjald ... 8**

**§ 27. Uppsøgn ... 8**

**§ 28. Gerðarrættur ... 9**

**§ 29. Álitisfólkaskipan ... 9**

**§ 30. Løn og lønarútrokning hjá tímaløntum ... 9**

**§ 31. Uppsøgn og sjúka hjá tímaløntum ... 9**

**§ 32. Arbeiðstíð o. a. hjá tímaløntum ... 10**

**§ 33 Gildi sáttmálans ... 10**

**Fylgiskjøl ... 11**

*Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð ... 11*
*Starvsfólkapolitikkur ... 15*

**Landsstýrið ásannar, at felagið hevur samráðingarrættin viðvíkjandi øllum fakligum viðurskiftum hjá limunum.**

**§ 1. Sáttmálaøki**
Hesin sáttmáli er fyri pedagogar, ið starvast hjá kommunum, hjá landinum og á sjálvsognarstovnum (heilt ella partvís fíggjaðir við almennari játtan).

**§ 2. Setanartreytir**
Treytin fyri at verða settur í starv er, at viðkomandi hevur lokið námsfrøðiligt prógv, ella samsvarandi prógv, ið er góðkent av Mentamálaráðnum og Føroya Pedagogfelag.
**Stk. 2.** Um eingin pedagogur søkir starvið, kann hjálparfólk verða sett fyribils, til pedagogur søkir starvið. Normerað størv, sum ikki eru sett við pedagogum, skulu lýsast leys minst 6. hvønn mánað. Sambært semju millum sáttmálapartarnar kann undantak gerast, so størvini verða lýst leys við eitt ára millumbili. *Partarnir eru samdir um, at § 2 stk. 2 verður sett úr gildi galdandi til 30. juni 2027.*

**§ 3. Løn**
Lønin er ásett í lønartalvum galdandi fyri henda sáttmála.

*A.Dagstovnaøkið*

*Pedagogar* verða løntir á lønarstigunum 11, 13, 15, , 17, 19, 21  22, 23 og 24

Forskúlanámsfrøðingar verða løntir á lønarstigunum 13, 15, 17, 19, 21, 23 og 24 og fylgja hesir arbeiðstíðini hjá lærarunum. Sí serskild semja frá 17. juni 2015.

Leiðarastørv og varaleiðarastørv verða flokkað eftir hesari stigatalsskipan:
a) hvørt barn undir 3 ár telur 2 stig
b) hvørt barn yvir 3 ár telur 1 stig
c) hvørt fulltíðarstarv telur 5 stig, og fyri parttíðarsett verður stigatalið roknað lutvíst til tímatalið.

d) Fyri serstovnar og dagstovnar við serdeildum verða løgd 40 stig aftrat.
e) Hækkar stigatalið, hækkar lønarflokkanin at galda frá fyrsta í komandi mánaði.
f) Lækkar stigatalið, lækkar lønarflokkanin í sambandi við, at starvið verður sett av nýggjum.

*Leiðarar*
0 - 119 stig á lønarstigunum 25, 27, 29
120 - 289 stig á lønarstigunum 29, 31, 33
290 - stig á lønarstigunum 31, 33, 35

*Varaleiðarar*
0 – 119 stig + 1 lønarsstig
120 - 289 stig + 2 lønarstig
290 - stig + 2 lønarstig
Skiftisskipan: Varaleiðarar, sum í dag fáa +3 stig halda fram eftir gomlu skipanini.

*Deildarleiðarar á frítíðarskúlum* verða løntir sum leiðarar á dagstovnum.

*Námsfrøðiligir ráðgevar*
Verða løntir á lønarstigunum , 19, 21,  23, 25 og 26.

*Stig 17 fellur burtur. Ráðgevarar sum standa á stig 17 flyta á stig 19 pr. 1. juli 2024. Hesir fáa nýggjan starvsaldurdag, t.e. at hesir skulu vera 2 ár á stig 19, áðrenn hesir verða fluttir á stig 21.*

*Stig 24 fellur burtur 1. juli 2024. Ráðgevarar flyta á stig 25 pr. 1. juli 2024. Hesir fáa nýggjan starvsaldursdag, t.e. at hesir skulu vera 2 ár á stig 25, áðrenn hesir verða fluttir á stig 26.*

*B. Almannaverkið og sjálvsognarstovnar undir landinum*
*Námsfrøðingar* verða løntir á lønarstigunum 11, 13, 14, 16, 17, 19, 21, 23 og 24.

*Serligt skipað miðnám undir Almannaverkinum*
Verða lønt á lønarstigunum 13, 15, 17, 19, 21, 23, 24.

*Leiðarastørv og varaleiðarastørv* á serstovnum verða flokkað eftir einum grundflokkanartali GFT, sum verður roknað soleiðis:
a) døgnstovnabrúkarar telja 1 stig
b) dagstovnabrúkarar telja 0,5 stig
c) brúkarar í egnum bústaði, sum hava tilknýti til ein døgnstovn og brúkarar, ið eru í familjurøkt telja 0,3 stig

d) brúkarar í døgnumlætting telja 1,5 stig
e) hvørt fulltíðarstarv telur 0,7115 stig, og fyri parttíðarstarv verður stigatalið roknað lutvíst í mun til tímatalið.

f) Hækkar stigatalið, hækkar lønarflokkanin at galda frá fyrsta í komandi mánaði.
g) Lækkar stigatalið, lækkar lønarflokkanin í sambandi við at starvið verður sett av nýggjum.

*Leiðarar*
0 – 15 stig verða løntir á lønarstigunum 26, 28, 30
15,01 – 25 stig verða løntir á lønarstigunum 27, 29, 31
25,01 - stig verða løntir á lønarstigunum 29, 31, 34
Varaleiðarar verða løntir á lønarstigunum 17, 19, 21, 23, 24.

*Almannaverkið*
Eindarleiðarar og leiðarar eru løntir sambært lønartalvu fyri tænastumenn landsins.
Eindarleiðarar sum hava 30 ella fleiri ársverk, verða løntir í lønarflokki 35, umframt 15% í eftirlønargjaldi.
Eindarleiðarar sum hava færri enn 30 ársverk, verða løntir í lønarflokki 34, umframt 15% í eftirlønargjaldi.
Leiðarar á stovnum, sum bara hava dagtilboð, verða løntir í lønarflokki 32.
Leiðarar á stovnum við døgntilboði verða løntir í lønarflokki 33.

Samskiparar fáa eina mánaðarliga eftirlønargevandi viðbót á kr 2.000,-
Faksamskiparar fáa eina mánaðarliga eftirlønargevandi viðbót á kr. 3.000,-
Seravtala um samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð á næmingaheimum.
Núgaldandi venja um samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð á næmingaheimunum, sum verður givin í frítíð, verður framvegis galdandi til onnur avtala verður gjørd.

*Leiðarin á Rásini*
Verður løntur á lønarstigunum 29, 31 og 34.

*C. Stuðlar, stuðulsstovnar og stuðulsskipanir*
Stuðulspedagogar verða løntir á lønarstigunum 11, 13, 14, 16, 17, 19, 21, 23 og 24.

*Leiðarar á stuðulsskipanum* fylgja stigatalsskipanini á dagstovnaøkinum, tó verða 40 stig løgd afturat.
0 - 79 stig - lønarstigini 20, 22, 24, 26
80 - 119 stig - lønarstigini 22, 24, 26, 28
120 - 174 stig - lønarstigini 24, 26, 28, 30
175 - 290 stig - lønarstigini 26, 28, 30, 32

*D. Størv í Fólkaskúlanum og á Heilsuskúlanum*
*Námsfrøðingar knýttir at serstovum í fólkaskúlanum*
verða lønt á lønarstigunum 13, 15, 17, 19, 23 og 24.

Leiðsla skúlans ger av, hvussu nógv tíð skal til fyrireiking, uppfylging og annað sum part av arbeiðstíðini smb. § 9 í sáttmálanum.

*Námfrøðiligir stuðlar í skúlum*
verða løntir á lønarstigunum 11, 13, 14, 16, 17, 19, 21, 23 og 24.

*Námsfrøðingar á skúlanum á Trøðni*
verða løntir á lønarstiginum 13, 15, 17, 19 21, 23 og 24.

Verandi lokala siðvenja, fyri hvussu arbeiðstíðin hjá pedagogum á skúlanum á Trøðni er skipað, heldur fram. T.e. eftir § 2 í avtaluni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið frá 26. apríl 2001.

*Pedagogurin á Sernámsdeplinum* verður løntur á stigi 24.

*Námsfrøðingar á Heilsuskúlanum*
Námsfrøðingar, ið undirvísa á námsfrøðihjálpara útbúgvingini, verða lønt á lønarstigunum 13, 15, 17, 19, 22 og 24.

Um námsfrøðingurin hevur pedagogikum, fær hann førleikaviðbót.

Arbeiðstíðin hjá námsfrøðingum á skúlanum verður skipað á sama hátt sum hjá øðrum lærarum í føstum starvi.

Samsýning svarandi til 5% av endalønini hjá pedagogum verður latið, sum mánaðarlig løn, tá námsfrøðingur hevur námshjálparalesandi í starvslæru.

**§ 4. Parttíðarsetan**
Hjá parttíðarsettum verður brotparturin av lønini niðurskrivaður samsvarandi arbeiðstíðini.
**Stk. 2** Parttíðarsett, ið arbeiða meira enn tað tímatal, ið er avtalað, sum ikki er yvirtíðararbeiði, verða samsýnt í sama mun, antin við frítíð ella við vanligari tímaløn (1/2080). Tænasta útyvir arbeiðstíðarnormin, sum er galdandi fyri fulltíðarsett á stovninum, er yvirtíðararbeiði.

**§ 5. Starvsaldur**
Starvsaldur er tvey ár á hvørjum lønarstigi.
**Stk. 2.** Starvsaldur verður roknaður fyri minst 15 tíma arbeiði um vikuna í miðal. Frá 1. januar 2025 verður galdandi: Um pedagogur kann prógva 59 tímar arbeiði í einum mánaði, so telur tað við í starvsaldrinum.
**Stk. 3.** Víðari útbúgving innan tað pedagogiska økið telur við í starvsaldri.
**Stk. 4.** Starvsaldur verður vunnin fyri arbeiði innan tað pedagogiska virkisøkið. Serligar arbeiðsroyndir kunnu telja við í starvsaldurin.
**Stk. 5.** Pedagogar, ið verða settir í starv í hægri lønarflokki enn í starvinum frammanundan, fáa við setanina starvsaldur ið svarar til, at viðkomandi verður løntur eftir næsta hægri lønarstigi í nýggja lønarflokkinum. Starvsaldur verður annars soleiðis, at starvsfólk koma beinanvegin á eitt lønarstig, sum tryggjar, at tey nú og framyvir koma at fáa eina flokkan, sum liggur hægri enn flokkanin í tí lægra flokkaða starvinum.
**Stk. 6.** Tá ið størv verða umflokkað, fáa teir pedagogar, sum í hesum sambandi flyta upp í hægri lønarflokk, sama lønaraldur sum í fyrra starvinum.
**Stk. 7.** Tá ið pedagogur fer úr starvi, hevur setanarstaðið skyldu at útskriva lønar- og tænastualdurskort.

**§ 6. Eftirløn**
Fyri starvsfólk, sum eru sett eftir hesum sáttmála, og sum arbeiða minst 15 tímar um vikuna, skal arbeiðsgevarin gjalda eftirlønargjald.
**Stk. 2.** Eftirlønargjaldið hjá arbeiðsgevaranum á kommunalu stovnunum er 12% av lønini. Eftirlønargjaldið á kommunalu stovnunum hækkar til 13 % galdandi frá 1. januar 2025. Eftirlønargjaldið hjá arbeiðsgevaranum á landsins stovnum er 14% av lønini.
**Stk.3** Parttíðarsett, ið arbeiða yvir ásettan norm, hava rætt til eftirløn av meirarbeiðstímum, tó í mesta lagi svarandi til lønina til fullan mánaðarnorm.
**Stk. 4.** Eftirlønargjaldið skal gjaldast í eina av pørtunum góðkenda eftirlønarskipan..
**Stk. 5.** Fyri starvsfólk, sum ikki kunnu verða tikin upp í eftirlønartryggingarskipanina orsakað av vantandi heilsuváttan, skal eftirlønargjaldið gjaldast til eina uppsparingarskipan.

**§ 7. Felagslívstrygging**
Stovnurin flytur vegna mánaðarlønt starvsfólk hvønn mánað eina upphædd, ið pedagogfelagið ásetur, til eina felags lívstrygging. Hetta er tó ikki galdandi fyri starvsfólk, ið eru 67 ár og eldri.
**Stk. 2.** Peningurin skal flytast í ein grunn, sum Føroya Pedagogfelag umsitur. Saman við flytingini skulu fylgja upplýsingar um navn, føðingardag, bústað og nær viðkomandi er komin í starv.

**§ 8. Fyribilssetan í hægri starv**
Pedagogar, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi fyribils røkja hægri starv í meira enn 1 viku samfelt, eiga í hesum tíðarskeiði at verða løntir við somu løn, sum teir høvdu fingið, um teir vórðu settir í starv, treytað av, at teir taka á seg arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

**§ 9. Arbeiðstíð**
Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.
**Stk. 2.** Reglurnar, sum eru galdandi fyri tænastumenn felagsins um arbeiðstíð, meirarbeiði, yvirarbeiðspening, samsýning fyri tænastu leygardagar, sunnu- og halgidagar og serstakar frídagar, eru eisini galdandi fyri henda sáttmála.

**§ 10. Tíð til annað arbeiði**
Hjá pedagogum og hjálparfólki á dagstovnum skal tíð setast av til at fyrireika og eftirmeta pedagogiska arbeiðið.
**Stk. 2:** Hjá pedagogum á dagstovnum kann ein tími í miðal um vikuna brúkast til at fyrireika pedagogiska arbeiðið. Leiðarin á stovninum hevur ábyrgd av tilrættaleggjan av hesum arbeiðinum. Viðvíkjandi foreldrafundum og starvsfólkafundum verður skipanin sum higartil.

**§ 11. Samsýning/løn fyri ólagaliga arbeiðstíð.**
Gjøldini fyri ólagaliga arbeiðstíð verða latin sum ásett í lønartalvuni og í talvuni um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð, ið verður løgd sum fylgiskjal til sáttmálan. Gjøldini fyri ólagaliga arbeiðstíð, verður roknað sum fast prosent av tímalønini á stigi 11, kvøld 18%, nátt 22% og leygardag 25%.
**Stk. 2.** Fyri arbeiði sunnu- og halgidagar og serstakar frídagar verður latið hálvur tími aftrat fyri hvønn arbeiðstíma. Ynskir starvsfólk, at so skal vera, og arbeiðið eftir ætlan viðkomandi stovns loyvir hesum, tá skal tað bera til, at starvsfólkið í staðin fyri avspáking fær útgoldið frítíðina við vanligari tímaløn.
**Stk.3.** Pedagogar innan dagstovnaøkið, sum arbeiða mánadag til fríggjadag, ið fáa álagt arbeiðið leygardag, sunnudag ella á serstøkum frídegi fáa goldið + 100 %.

**§ 12. Gjald fyri summar- og frítíðarlegur**
Fyri gerandisdagar verður latin eykaviðbót svarandi til kvøldviðbót fyri 16 tímar um samdøgrið. Fyri leygar-, sunnu- og halgidagar og serstakar frídagar verður latið tað tvífalda av omanfyri nevndu gerandisviðbót. Treytin fyri at nýta hesa avtalu er, at talan er um eina frammanundan avtalaða og avmarkaða tíð, og at veruliga er talan um leguupphald.

**§ 13. Lønarútgjaldan**
Sáttmálaðlønt fáa goldið lønina afturút, og skulu hava útgreinaðan lønarseðil, har eisini verður tilskilað møguligt eftirlønargjald. Lønin verður útgoldin um leið tann 25. í mánaðinum.
**Stk. 2.** Pedagogar, sum eru forútløntir, varðveita rættindini at vera forútløntir.

**§ 14. Setanarbræv - Starvslýsingar**
Mánaðarlønt starvsfólk fær, í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina, setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

1. navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
2. nær setanin tekur við
3. galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
4. starvsheiti,
5. byrjanarløn (grundløn umframt fastar viðbøtur og/ella ískoyti),

6. eftirlønargjald,
7. starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
8. uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta,
9. setanarbrotpartur, arbeiðstíð,
10. frítíð við løn og frítíðaríkoyti,
11. setanarøki og
12. arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri arbeiðsstaðir, skal verða viðmerkt á hvørjum arbeiðsstaði umsøkjarin hevur høvuðsstarv).

**Stk. 2** Arbeiðsgevarin sendir samstundis felagnum avrit av setanarskrivinum, fyri limir í Føroya Pedagogfelag.
**Stk. 3.** Tá ið starv er leyst, skal starvið lýsast leyst alment á ein slíkan hátt, at almenningurin verður kunnugur við lýsingina. (Viðm. Hetta kann gerast við at lýsa í bløðunum, umframt á internetsíðum, ið hava stóra útbreiðslu, ið mun til konkreta málbólkin og har almenningurin kann væntast at vita, at størv verða lýst. Arbeiðsgevarar eiga at senda starvslýsingina til Føroya Pedagogfelag, ið leggur hana á heimasíðu felagsins.)

Tilskilast skal, hvat starvið umfatar, setanarbrot, arbeiðstíð og hvørjum lønarflokki starvið verður lønt eftir. Sama er galdandi, tá ið lýst verður eftir fyribils hjálp.
Umsóknarfreistin eigur ikki at vera minni enn 14 dagar.
Er talan um nýtt starv, sum higartil ikki er flokkað, skulu sáttmálapartarnir samráðast um flokkan, áðrenn starvið verður lýst leyst.

**§ 15. Frítíðarreglur**
Tey, ið eru sett eftir hesum sáttmála, ganga eftir løgtingslóg nr. 30 frá 1.4.1986 "Frítíð við løn" við broytingum.
**Stk. 2.** Tey, ið eru sett eftir hesum sáttmála, eiga rætt til serstakt frítíðaríkoyti svarandi til 1,5% av allari árslønini í undanfarna innvinningarárinum og 12% av útgoldnari yvirtíðarløn. Frá 1. apríl 2012 verða 12% í frítíðarløn av gjøldum fyri ólagaliga arbeiðstíð goldin í grunn.
**Stk. 3.** Parttíðarsett, ið arbeiða meira enn ásettu arbeiðstíðina, fáa 12% í frítíðarløn fyri meirarbeiði.

**§ 16. Frídagar**
Umframt sunnu- og halgidagar eru at rokna sum serstakir frídagar: Jólaaftan, nýggjársaftan, flaggdagur, ólavsøkudagur, páskaaftan, hvítusunnuaftan, grundlógardagur eftir kl. 12.00 og ólavsøkuaftan eftir kl. 12.00.
**Stk 2.** Starvsfólk hava herumframt rætt til serstakar frídagar sambært avtaluni um serstaka fríviku.

**§ 17. Løn undir sjúku og eftirsitiløn**
Undir sjúku verður veitt sjúkraløn eftir reglunum í løgtingslóg um starvsmenn.
**Stk. 2.** Starvsfólk kunnu fáa frí fyrsta sjúkradag hjá børnum teirra.
**Stk. 3.** Tá ið pedagogur, sum er løntur eftir hesum sáttmála, doyr, eigur eftirsitandi hjúnarfelagi/sambúgvi, ella børn undir 18 ár, rætt til løn í mun til uppsagnartíðina, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir.
**Stk. 4.** Eftirsitiløn er tann løn, sum viðkomandi hevði. Lønin í mánaðinum, tá ið pedagogurin doyr, verður ikki roknað uppí eftirsitilønina.

**§ 18. Barnsferð**
Starvskvinna, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.
*stk. 2.* Starvskvinna hevur rætt til barsilsfarloyvi við løn í 4 vikur undan mettari føðing og í 24 vikur eftir føðing, t.e. 28 vikur tilsamans.
*stk. 3.* Prógvar *starvskvinna* við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvskvinna hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið

4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2. Samlaða barsilsfarloyvi við løn er framvegis 28 vikur.
*stk. 4.* Umframt nevndu sømdir kann starvskvinna fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.
*Stk. 5.* Hendan ásetingin fær gildið fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024:
Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.
Stk. 6. Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í sambandi við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.
Stk. 7. Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

**§ 19. Farloyvi**
Pedagogur kann fáa farloyvi, tá ið tað ikki nervar arbeiðið á stovninum. Farloyvi kann játtast upp til 5 ár. Setanarstaðið hevur ábyrgd av at hava starvið leyst til viðkomandi, tá ið farloyvið er úti.
**§ 20. Skeiðluttøka**
Verður starvsfólk álagt at luttaka á skeiði, verður hvør skeiðsdagur at rokna sum vanligur arbeiðsdagur, tó í mesta lagi 8 tímar. Um skeið liggur í vikuskifti ella á føstum frídegi eftir § 16, verður latin tímasamsýning fyri ólagaligu tíðina, samb. serstakari avtalu um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð
Fyri skeið, sum liggja uttan fyri vanligu arbeiðstíðina, og sum eru ikki áløgd, kann stovnurin lata aðra frítíð tíma fyri tíma í staðin fyri tíðina, ið er nýtt til skeiðluttøku. Ferðing til og frá skeiði, sum liggja aðrastaðni enn vanliga arbeiðsstaðið, verður roknað í skeiðstíðina.

**§ 21. Eftirútbúgving - Víðari útbúgving**
Pedagogar hava rætt at koma á eftirútbúgvingarskeið, fyri at halda útbúgvingina við líka. Allar útreiðslur í hesum sambandi verða goldnar av arbeiðsgevaranum.

**§ 22. Førleikaviðbót**
Førleikaviðbót kann latast fyri eftirútbúgving. Hesar viðbøtir eru førleikaviðbøtur og eru knýttar at starvinum. Fyri at kunna fáa førleikaviðbót, skal útbúgvingin verða kravd og eftirútbúgvingin skal verða frá góðkendum útbúgvingarstað. Sjálvt um pedagogur hevur tikið meira enn eina eftirútbúgving, so verður bara ein viðbót latin. Er starvið parttíðarstarv, verður viðbótin samsvarandi setanarbrøkinum.
Eftirútbúgving 120 tímar: 750,- kr.
Eftirútbúgving 160 tímar: 1.000,- kr.
Eftirútbúgving 200 tímar: 1.250,- kr.

**§ 23. Undirvísingarløn**
Pedagogar hava rætt til serliga løn fyri frálæru til bólkar eftir hesum reglum:
1) Liggur fyrireiking og frálæra í arbeiðstíðini, fæst einki endurgjald.

2) Liggur frálæra í vanligari arbeiðstíð, og fyrireiking uttan fyri arbeiðstíð, verður endurgoldin hálv tímaløn fyri ta tíð, frálæran varir.
3) Liggur frálæra eftir arbeiðstíð, verður endurgoldið fyri teir tímar, frálæran varir.
*Stk. 2.* Fyri frálæru til pedagogar er tímalønin 418,27 kr., íroknað fyrireiking.
*Stk. 3.* Fyri frálæru til aðrar fakbólkar, verða goldnar 341,02 kr., íroknað fyrireiking.
*Stk. 4.* Fyri frálæru eftir kl. 17.00, verður latið ískoyti uppá 20%.
*Stk. 5.* Fyri fyrilestrar verður latið 1.048,39 kr. fyri 1. tíman og kr. 440,10 fyri hvønn fylgjandi tíma, íroknað fyrireiking.
Av omanfyristandandi gjøldum verður goldið serstakt frítíðargjald áljóðandi 12%.
Gjøldini verða dagførd í felagsavtaluni um vaktargjøld v.m.

**§ 23a. Starvslæruvegleiðarar**
Uppgávan sum vegleiðari í starvslæruni innan námsfrøði á Námsvísundadeildini á Fróðskaparsetur Føroya verður samsýnd vi

- Fyri hvønn starvslærutíma pr. næming er samsýningin 0,1 % av endalønini hjá pedagogum.
- Fyri hvønn samtalutíma pr. næming: 0,65 % av endalønini hjá pedagogum
- Vikarsamsýning til stovnin fyri hvønn samtalutíma er tímalønin hjá pedagogum á endastigi.

**Stk. 2.** Frítíðarløn (12 %) verður latin.
**Stk. 3.** Samsýningarnar verða útgoldnar sambært uppgerð eftir lokið starvslæruskeið.

**§ 24. Endurgjald fyri koyring, tíma- og dagpeningur**
Dag- og tímapeningur undir tænastuferð og endurgjald fyri nýtslu av egnum bili í tænastuørindum verður eftir reglum í avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Tænastumannafelagið.

**§ 25. Tænastubúni**
Hospitalspedagogar fáa frían tænastubúna. Tá ið hetta ikki letur seg gera, ella tað av øðrum orsøkum verður álagt hospitalspedagogum at brúka egin klæði, verður latin ein árlig viðbót á kr. 1.764,-.

**§ 26. Telefongjald**
Dagrøktarleiðarar og varadagrøktarleiðarar, ið nýta egna telefon í samband við arbeiði, fáa endurgjald fyri fasta telefonfelagagjaldið og kr. 206,- umframt fyri hvønn ársfjórðing.

**§ 27. Uppsøgn**
Uppsøgn millum partarnar skal vera uppsagnarfreistin sambært starvsmannalógina.
**Stk. 2.** Ætlar setanarmyndugleikin at siga starvsfólk úr starvi, skal ætlanarskriv um uppsøgn verða latið felagnum og starvsfólkinum til ummælis við minst 14 daga freist, um ikki eymir upplýsingar sambært grein 27 í fyrisitingarlógini ella revsilógini eru í tí (í tí føri fær Føroya Pedagogfelag samstundis fráboðan um, at ætlanarskriv er sent starvsfólkinum).
**Stk. 3.** Heldur Føroya Pedagogfelag, at uppsøgnin ikki skal fremjast, ella at uppsøgnin ikki er nóg væl lýst, kann felagið krevja uppsøgnina viðgjørda á fundi við setanarmyndugleikan, áðrenn uppsøgnin verður givin. Setanarmyndugleikin kann krevja samráðingarfund um uppsøgnina innan 3 vikur eftir at fráboðanin smb. stk. 2. er móttikin.
**Stk. 4.** Heldur Føroya Pedagogfelag, at uppsøgnin er ógrundað, kann felagið innan ein mánað eftir uppsøgnina krevja fund við setanarmyndugleikan. Fæst ikki semja á fundinum, kann málið innan ein mánað verða viðgjørt í eini uppsagnarnevnd, har Føroya Pedagogfelag og setanarmyndugleikin velja tveir limir hvør, og í felag velja 5. limin, ástøðumannin.
Fæst ikki semja um fimta limin, skal hann útnevnast av Føroya Rætti.
Nevndin skipar sjálv fyri arbeiðshátti sínum.
Uppsagnarnevndin kann avhoyra partarnar og vitni.

Nevndin ger ein úrskurð, og verður úrskurðurin, at uppsøgnin er ógrundað, kann nevndin áleggja arbeiðsgevaranum, umframt uppsagnarlønina, at gjalda tí uppsagda eitt endurgjald, sum í mesta lagi skal svara til helvtina av uppsagnarlønini.
Um viðkomandi starvsfólk, tá ið tað var uppsagt, uttan steðg hevur verið í starvi í 10 ár, kann endurgjaldið setast til 4 mánaðarlønir.
Um viðkomandi starvsfólk, tá ið tað var uppsagt, uttan steðg hevur verið í starvi í 15 ár, kann endurgjaldið setast til 6 mánaðir.
Nevndin avgerð, hvør skal rinda útreiðslurnar av nevndararbeiðinum.

**§ 28. Gerðarrættur**
Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarrætt.

**§ 29. Álitisfólkaskipan**
Álitisfólkaskipanin, sum er avtalað millum sáttmálapartarnar, er eisini galdandi fyri tey sum eru sett eftir hesum sáttmála.

**§ 30. Løn og lønarútrokning hjá tímaløntum**
Sum tímaløntir verða sett tey, ið:
a) í miðal arbeiða minni enn 15 tímar um vikuna ella
b) ikki verða sett í fast starv, men sum avloysarar undir frítíð, sjúku o. l. ella til annað fyribils arbeiði, sum varir minni enn 3 mánaðir.
c) Frá 1. februar 2018 verður eftirlønin goldin av tímaløn. Eftirlønargjaldið fylgir bundna eftirlønargjaldinum, ið er ásett í § 2, stk. 1 í eftirlønarlógini (ll. nr. 49/2013), p.t. 10%.

Tímaløntir pedagogar , sum arbeiða meira enn 59 tímar um mánaðin, fáa sama eftirlønargjald sum fastlønt fyri teir mánaðir, arbeitt verður meira enn 59 tímar um mánaðin.
Viðmerking: Hetta verður avgreitt fyri hvønn mánað sær.

*Broytingin í eftirlønarviðurskiftunum hjá tímaløntum pedagogum á kommunala sáttmálaøkinum er galdandi frá 1. januar 2025.*

**Stk. 2.** Í tíðarskeiðinum 6.00-17.00 verður tímalønin 1/2080, og í tíðarskeiðinum 17.00-6.00 sum 1/1924 av árslønini á viðkomandi stigi.
**Stk. 3.** Um ein pedagogur verður settur sum vikarur í einum hægri flokkaðum starvi, fær hann tímalønina sum er galdandi á 1. stigi í viðkomandi starvi. Um tann tímalønin er lægri ella tann sama tímaløn sum viðkomandi hevur fingið, verður hann løntur eftir tí næsta hægra lønarstiginum.
**Stk. 4.** Lønarútgjalding fer fram mánaðarliga.
**Stk. 5.** Tímalønt fáa løn fyri í minsta lagi 3 tímar fyri hvønn dag.
**Stk. 6.** Tímalønt fáa 4% av allari lønini sum samsýning fyri serstakar frí- og halgidagar.

**§ 31. Uppsøgn og sjúka hjá tímaløntum**
Fyri tímalønt, sum eru nevnd í grein 27, stk. 1., pkt. a er uppsagnarfreistin henda:
a) 14 dagar uppsagnarfreist teir tríggjar fyrstu mánaðirnar.
Ein mánað uppsagnarfreist, galdandi frá tí fyrsta í mánaðinum at rokna, tá ið viðkomandi hevur verið í starvi meira enn tríggjar mánaðir.
b) Fyri onnur tímalønt er uppsagnartíðin 2 dagar fyri hvønn mánað, arbeitt hevur verið, tó í mesta lagi ein mánað.
**Stk. 2.** Tímalønt, sum biðin verða til arbeiðis, sum avmarkað er í tíð, skulu, um tey gerast sjúk ta tíðina, sum arbeiðið var ætlað, hava løn undir sjúku.

**§ 32. Arbeiðstíð o. a. hjá tímaløntum**
Fyri tímalønt eru hesar greinir í sáttmálanum galdandi:
§ 9. Arbeiðstíð
§ 10. Tíð til annað arbeiði
§ 11. Samsýning fyri ólagaliga arbeiðstíð
§ 12. Gjald fyri summar- og frítíðarlegur
§ 15. Frítíðarreglur
§ 16. Frídagar
§ 21. Endurgjald fyri koyring, tíma- og dagpening.

**Protokollat**
Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag eru samd um í sáttmálaskeiðinum at lýsa arbeiðstíðarreglurnar fyri fólkaskúlar.

**Arbeiðstíðarreglur hjá landinum**
Arbeiðið við at tillaga arbeiðstíðarreglurnar hjá landinum, sum er byrjað heldur fram. Miðjað verður ímóti, at arbeiðið skal verða liðugt í sáttmálaskeiðnum.

**Viðvíkjandi lønartalvu**
Partarnir eru samdir um í sáttmálaskeiðinum at arbeiða við at gera nýggja lønartalvu.

**§ 33 Gildi sáttmálans**
Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2023, og kunnu báðir partar siga hann upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 31. mars 2026. Í samband við uppsøgn av sáttmálanum kann annar parturin krevja, at samráðingar byrja innan ein mánað eftir, at krøv eru send mótpartinum. Tó kann parturin í fyrsta lagi krevja, at samráðingar byrja um endurnýggjan av sáttmálanum 3 mánaðir, áðrenn hann fer úr gildi.

*Tórshavn tann*
*29. apríl 2024*

**Føroya Pedagogfelag**

**Fíggjarmálaráðið**

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**

**Fylgiskjøl**

*Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð*

| Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð frá 01.04.2023 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Frá kl. | Til kl. | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
| 0 | -1 | 36,31+41,26 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 |
| 1 | -2 | 36,31+41,26 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 |
| 2 | -3 | 36,31+41,26 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 |
| 3 | -4 | 36,31+41,26 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 |
| 4 | -5 | 36,31+41,26 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 |
| 5 | -6 | 36,31+41,26 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 |
| 6 | -7 | | | | | | 41,26 | |
| 7 | -8 | | | | | | 41,26 | |
| 8 | -9 | | | | | | 41,26 | |
| 9 | -10 | | | | | | 41,26 | |
| 10 | -11 | | | | | | 41,26 | |
| 11 | -12 | | | | | | 41,26 | |
| 12 | -13 | | | | | | 41,26 | |
| 13 | -14 | | | | | | 41,26 | |
| 14 | -15 | | | | | | 41,26 | |
| 15 | -16 | | | | | | 41,26 | |
| 16 | -17 | | | | | | 41,26 | |
| 17 | -18 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70+41,26 | 29,70 |
| 18 | -19 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70+41,26 | 29,70 |
| 19 | -20 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70+41,26 | 29,70 |
| 20 | -21 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70+41,26 | 29,70 |
| 21 | -22 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70+41,26 | 29,70 |
| 22 | -23 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70 | 29,70+41,26 | 29,70 |
| 23 | -24 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31 | 36,31+41,26 | 36,31 |

| | |
|---|---|
| Umlagdir tímar: | 23,25 |
| Varningsgjald: | 25,77 |

| Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð frá 01.01.2024 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Frá kl. | Til kl. | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
| 0 | -1 | 37,62+42,76 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 |
| 1 | -2 | 37,62+42,76 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 |
| 2 | -3 | 37,62+42,76 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 |
| 3 | -4 | 37,62+42,76 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 |
| 4 | -5 | 37,62+42,76 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 |
| 5 | -6 | 37,62+42,76 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 |
| 6 | -7 | | | | | | 42,76 | |
| 7 | -8 | | | | | | 42,76 | |
| 8 | -9 | | | | | | 42,76 | |
| 9 | -10 | | | | | | 42,76 | |
| 10 | -11 | | | | | | 42,76 | |
| 11 | -12 | | | | | | 42,76 | |
| 12 | -13 | | | | | | 42,76 | |
| 13 | -14 | | | | | | 42,76 | |
| 14 | -15 | | | | | | 42,76 | |
| 15 | -16 | | | | | | 42,76 | |
| 16 | -17 | | | | | | 42,76 | |
| 17 | -18 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78+42,76 | 30,78 |
| 18 | -19 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78+42,76 | 30,78 |
| 19 | -20 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78+42,76 | 30,78 |
| 20 | -21 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78+42,76 | 30,78 |
| 21 | -22 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78+42,76 | 30,78 |
| 22 | -23 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78 | 30,78+42,76 | 30,78 |
| 23 | -24 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62 | 37,62+42,76 | 37,62 |

| | |
|---|---|
| Umlagdir tímar: | 23,25 |
| Varningsgjald: | 25,77 |

## Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð frá 01.04.2024

| Frá kl. | Til kl. | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 0 | -1 | 39,20+44,55 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 |
| 1 | -2 | 39,20+44,55 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 |
| 2 | -3 | 39,20+44,55 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 |
| 3 | -4 | 39,20+44,55 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 |
| 4 | -5 | 39,20+44,55 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 |
| 5 | -6 | 39,20+44,55 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 |
| 6 | -7 | | | | | | 44,55 | |
| 7 | -8 | | | | | | 44,55 | |
| 8 | -9 | | | | | | 44,55 | |
| 9 | -10 | | | | | | 44,55 | |
| 10 | -11 | | | | | | 44,55 | |
| 11 | -12 | | | | | | 44,55 | |
| 12 | -13 | | | | | | 44,55 | |
| 13 | -14 | | | | | | 44,55 | |
| 14 | -15 | | | | | | 44,55 | |
| 15 | -16 | | | | | | 44,55 | |
| 16 | -17 | | | | | | 44,55 | |
| 17 | -18 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08+44,55 | 32,08 |
| 18 | -19 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08+44,55 | 32,08 |
| 19 | -20 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08+44,55 | 32,08 |
| 20 | -21 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08+44,55 | 32,08 |
| 21 | -22 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08+44,55 | 32,08 |
| 22 | -23 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08 | 32,08+44,55 | 32,08 |
| 23 | -24 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20 | 39,20+44,55 | 39,20 |

| | |
|---|---|
| Umlagdir tímar: | 23,25 |
| Varningsgjald: | 25,77 |

| Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð frá 01.04.2025 | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Frá kl. | Til kl. | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag | Leygardag | Sunnudag |
| 0 | -1 | 40,95+46,53 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 |
| 1 | -2 | 40,95+46,53 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 |
| 2 | -3 | 40,95+46,53 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 |
| 3 | -4 | 40,95+46,53 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 |
| 4 | -5 | 40,95+46,53 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 |
| 5 | -6 | 40,95+46,53 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 |
| 6 | -7 | | | | | | 46,53 | |
| 7 | -8 | | | | | | 46,53 | |
| 8 | -9 | | | | | | 46,53 | |
| 9 | -10 | | | | | | 46,53 | |
| 10 | -11 | | | | | | 46,53 | |
| 11 | -12 | | | | | | 46,53 | |
| 12 | -13 | | | | | | 46,53 | |
| 13 | -14 | | | | | | 46,53 | |
| 14 | -15 | | | | | | 46,53 | |
| 15 | -16 | | | | | | 46,53 | |
| 16 | -17 | | | | | | 46,53 | |
| 17 | -18 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50+46,53 | 33,50 |
| 18 | -19 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50+46,53 | 33,50 |
| 19 | -20 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50+46,53 | 33,50 |
| 20 | -21 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50+46,53 | 33,50 |
| 21 | -22 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50+46,53 | 33,50 |
| 22 | -23 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50 | 33,50+46,53 | 33,50 |
| 23 | -24 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95 | 40,95+46,53 | 40,95 |

| | |
|---|---|
| Umlagdir tímar: | 23,25 |
| Varningsgjald: | 25,77 |

# Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk á landsins stovnum

## 1. Inngangur

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleikar fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandi millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:
*Førleikamenning*
*Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum*
*Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum*
*Javnstøða*
Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá landinum lagt til onnur at reka.

## 2. Førleikamenning

Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá landsins stovnum. Tað er tað arbeið, sum tey í landsins tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at landsis stovnar mennast.
Partarnir eru tí samdir um, at:
miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum almennum stovnum við høgum tænastustigi.
hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur at seta sær miðvís menningarmál.
endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.
Starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.
Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á landsins stovnunum.

## 3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka stovninum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.
Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:
*Niðursett tíð*
Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:
a) vera fylt 60 ár
b) hava starvast hjá landinum seinastu 10 árini
c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett
Starvsfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.

Stovnurin kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

*Lægri starv*

Stovnur kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá landinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.

Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.

Stovnurin kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

*Niðursett tíð orsaka av sparingum*

Gera sparingar, at starvsfólk verða sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:

a. starvsfólkið hevur fylt 55 ár

b. starvsfólkið hevur starvast hjá landinum seinastu 10 árini

c. arbeisðtíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum**

Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.

Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**

Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6. Umleggja alment virksemi**

Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.